

## Føroyingar smittaðir við salmonella av at eta egg

Hendan síðsta mánaðin eru nakrir føroyingar blivnir sjúkir av salmonella. Tað vísir seg, at fleiri av teimum smittaðu hava etið egg, sum ikki hava verið gjøgnumhitað, antin sum stokt egg ella sum ráar eggjablommur á búffum. Í fleiri førum koma eggini frá Møllebjerggård Ægpakkeri og nú er neyvt eftirlit við einum garði, sum selir egg til Møllebjerg Ægpakkeri, tí illgruni er um salmonella á garðinum. Tað merkir, at garðurin ikki kann selja egg, fyrr enn Fødevarestyrelsen hevur kannað egg frá garðinum fyri salmonella. Tey smittaðu eggini eru frá búrhønum og eru í pakkum við 6, 10 ella 30 eggum í við haldføri 26. mai til 27. juli 2009. Men illgrunin um salmonella umfatar bara egg, sum eru stemplað við CHR-nr. 52395 og tey verða nú afturkallað. Heilsufrøðiliga Starvsstovan mælir fólki, sum hava keypt hesi egg, til at fara aftur í handilin við teimum ella beina tey burtur. Tá ið egg skulu nýtast í mati ella kakum, sum ikki verða gjøgnumhitaði, mælir Heilsufrøðiliga starvsstovan fólki til at nýta pasteuriserað egg. Í sambandi við salmonella eru sjúkuteknini leyst lív, vaml, búkpína, fepur og spýggja.

# Feskur og frystur fiskur í nýggjum Fiskakjallara

**Nýggjur fiskahandil er latin upp í miðbýnum í Havn. Navnið er Fiskakjallarin, og úrvalið er fryst og feskt úr havinum**

HANDIL
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*




Í dag klokkan 13 lat nýggjur handil upp í Dr. Jacobsensgøtu, yvir av Føroya Keypssamtøku í miðbýnum í Havn.

Tað er Jens Eli Ellefsen, ið letur henda handilin upp. Hann er kendur maður innan fiskivinnu, og hevur brúkt mestsum alt sítt lív í vinnuni. Eisini hevur hann givið út eina fløgu, og nú leggur hann aftur til brots við nýggja handilinum, ið fær navnið Fiskakjallarin.

Sum navnið eisini avdúkar, er talan um ein fiskahandil, og er talan um eitt stórt úrval av feskum og frystum úr Havinum.

- Vit hava avtalur við útróðrarbátar, so tað er heilt víst, at tað er feskur fiskur vit fáa. Tá tú keypir á uppboðssølunu, so kann 10 til 12 daga gamal fiskur liggja millum 2 til 3 daga gamla fiskin, og tí hava vit heldur valt at fáa frá útróðrabátum, sigur Jens Eli Ellefsen.

Millum vørurnar er alt frá vanligum feskum toskaog hýsuflaki, til gulllaksafars, hummara og fyrstafloks línukalva.

- Tað eru út við 30 sløg at velja millum, greiðir Jens Eli Ellefsen frá.

# Sermerkt myndakrimi til ung

**Í nýggju krimisøguni *Myndabókin* sleppa ungu lesararnir at royna seg sum detektivar tá teir sjálvir skulu kanna nakrar gátuførar fotomyndir**

BÓK
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Rithøvundurin Laura Trenter og fotografurin Katrin Jacobsen hava gjørt eina heldur øðrvísi krimibók fyri ung. Í bókini, sum hevur heitið *Myndabókin*, verða fotomyndir nevniliga blandaðar upp í loysnina av málinum, men mangan ørkymla tær meir enn at gera nakað greiðari. Fotomyndirnar eru prentaðar í bókini, og so kann lesarin sjálvur royna at vita, hvussu gátuføru myndirnar kanska kunnu uppklára løgna málið, sum ríður Gilbert sum ein marra.

Hann hevur nevniliga altíð vitað, at okkurt løgi er á ovastalofti. Líka síðani pápin doyði, hevur hatta loftið bæði lokkað hann og gjørt hann bangnan. Gilbert kennir á sær, at um tað er nakrastaðni, hann hevur ein møguleika at fáa meir at vita um pápin, so er tað uppi á ovastalofti.

Ein dagin byrjar okkurt løgið at henda. Ein gátufør ketta kemur fram allastaðni, har tað tykist ógjørligt at koma fram, og ein gomul omma tykist at kunna lesa tankar.

Og knappliga finnur Gilbert myndabókina hjá pápanum. Men okkurt er við myndunum, sum ikki er, sum tað eigur at vera. Gilbert kann bara ikki koma á, hvat tað er ... og nú er tað, at lesarin má hjálpa honum.

Krimisøgurnar hjá svenska høvundanum Laura Trenter eru væl dámdar millum børn og ung í svøríki. Nú fáa so eisini føroyskir lesarar høvi at kanna, hvat tað er við hennara søgum, sum hugtekur. Tað er Jón Joensen, sum hevur týtt bókina til føroyskt, sum Bókadeild Føroya Lærarafelags gevur út.




*Myndabókin Nakrar gátuførar fotomyndir gera "Myndabókina" til eina rættiliga øðrvísi krimisøgu*

# Føroya Tele yvirtekur virksemið hjá iConcept

**Føroya Tele yvirtekur nú virksemið hjá felagnum iConcept, ið hevur bjóðað tele- og breiðbandstøkni**

SAMANLEGGING
*Rógvi Nybo*
*Rogvi@sosialurin.fo*

iConcept hevur seinastu árini lagt dent á at menna nýmótans tænastur innan samskifti. Felagið hevur 3 tey seinastu árini bjóða teletænastur á føroyska marknaðinum, og hevur serliga lagt seg eftir at bjóða kundunum breiðbandstænastur saman við nettalu.

Fyri at gera tað møguligt at halda áfram við menning av nýggjum tænastum innan tele -og breiðbandstøkni, hevur iConcept valt at leggja virksemi sítt saman við Føroya Tele.

- iConcept hevur trý dugnalig starvsfólk. Hesi starvsfólk fara saman við øðrum dugnaligum Føroya Tele starvsfólkum at menna nýggjar spennandi tænastur bæði til heimamarknaðin og til ein marknað uttanfyri Føroyar sigur Kristian R. Davidsen stjóri á Føroya Tele.

Endaligasamanleggingin, verður formliga avgreidd, tá allar neyðugar samtyktir frá mynduleikunum fyriliggja. Til neyðugu góðkenningarnar fyriliggja, verða viðskiftafólk hjá iConcept passað av Føroya Tele.

- Fyri kundar hjá iConcept kemur hendan samanleggingin ikki at merkjast. Vit meina, at við hesi samanlegging, verður kundin enn betri stillaður og frammtíðartryggjaður. Saman við Føroya Tele verður málið við nýggjum spennandi tænastum rokkið enn skjótari, sigur Thomas Hansen, stjóri á iConcept.

Tær tænastur, ið iConcept higartil hevur veitt kundum sínum, verða tær somu, men í næstu framtíð er ætlanin, at samanleggingin við Føroya Tele skal føra til nýggjar og spennandi tænastur. Harumframt vilja kundarnir, framyvir kunna fáa allar samskiftistænastur á einum stað.